## DAGSINS MEINING

# Sorgarleikurin í Irak

Allur heimurin er um sjónvarpsskíggja vitni til sorgarleikin í Irak. Har ósek sivil og herfólk lata lív. Heimurin er býttur í tvey, tey, sum eru fyri hesum kríggi og tey, sum eru ímóti. Tey flestu eru tó samd um, at Saddam Hussein er eitt bølmenni álíkt Hitler og Stalin. Men var neyðugt at fara í kríggj, eitt kríggj, sum ongan enda tykist fáa og neyvan ein enda, har nakar verður sigursharri. Royndirnar at avvápna Irak vóru komnar væl áleiðis. Ein samdur heimur tók undir við arbeiðinum hjá ST, ið átti at hildið fram. Tað var ikki at ganga í fótafetum Chamberlains, sum mong halda.

Tað ávarað er um er júst við at henda. Eingin amerikanskur forseti, verjumálaráðharri ella herførari megnar frammanundan at siga, hvørjar avleiðingarnar vera av einum kríggi, serstakliga ikki har mótparturin hevur bøðlar sum Stalin sum fyrimynd. Hetta vistu teir áðrenn. Kortini tosaði amerikanski verjumálaráðharrin við stórum og sterkum orðum og segði, at eitt bumbuálop fór at verða framt, sum ikki hevði sín javnlíka í søguni. Og rætt var. Men til hvørja nyttu kunnu vit spyrja aftaná. Tað hevur ikki skelkað Saddam og hansara fólk, skilst. Hesi eru tvørturímóti farin at gera "helviti" heitt fyri innrásherliðini. Og hetta er bert byrjanin. Trongdur upp í ein krók kann Saddam jú finna uppá alt. Hann er samvitskuleysur. Tað vistu og vita vit. Hann fýrir ikki fyri at taka lívið av túsundtals av sínum egnu, um skuldin kann leggjast á amerikanarar. Harfyri var einasti mátin at koma honum til lívs ikki bara kríggj.

Tað var eitt mistak at fara í kríggj nú. Tí uppruddingararbeiðið var ikki liðugt. Tí flest øll lond vóru samd um, at alt skuldi gerast fyri at vinna á Saddam bert ikki við totalum kríggi. USA hevur gjørt mangt gott fyri mannaættina og fyri friðarinnar søk. Eingin ivi um tað. Men eisini USA kann taka feil. Og ikki minst tá forsetin eitur George Bush og verjumálaráðharrin Romsfeld. Hetta ery menn, sum bara síggja ein veg.

Tað kann gerast ein sonn vanlukka fyri USA og heimin, at ikki Al Gore gjørdist forseti. At ikki demokratar vunnu valini til senat og umboðsmannahús. Hvussu kann man leggja heimsins lagnu í hendurnar á manni, ið kensluleysur og arrogantur hevur verið við til at taka flest deyðadømdar amerikanarar av døgum og als ikki vil diskutera hesa inhumanu, óræ ttvísu og ómenniskjansligu revsing, tá ósek eisini verða tikin av døgum! Hvussu kann man krevja av honum at hava vit og skil og kenslur, tá tað um Irak ræður!

Tað er ein gáta, hví ikki sami Bush og heimsins einasta stórveldi gjørdi meira fyri at raka Saddam sjálvan, áðrenn farið varð í kríggj. Og tað tvingar okkum at seta fram ótespiligar spurningar. Vil man kríggj, tí krígsídnaðurin vil tað - fyri at sleppa at royna síni nýggju vápn? Vil man kríggj, tí Romsfeldarnir hava so stórt vald? Hetta kunnu sýnast sum "hjartaleysir" spurningar at seta, nú amerikanskir og bretskir hermenn vilja lata lív fyri at sleppa okkum av við ein bøðil. Men teir mugu setast eins væl og spurt hevur verið um nyttuna av avvápnaðararbeiðinum hjá ST. Og vit mugu so heldur ikki gloyma at seta spurningin: hevði Vesturheimurin víst palestinsku sakini størri ans, hevði støðan tá kunnað verið ein onnur! Kríggið er ein veruleiki, og vit kunnu nú bara vóna, at tað skjótt verður av, soleiðis at Saddam Hussein kann koma fyri altjóða brotsmannadómstólin.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Sjálvkravdi inkvisitiónsdómstólurin, Johan Dahl

**Tórbjørn Jacobsen**
*løgtinsmaður og fíggjarnevndarlimur*



Johan Dahl er eitt undarligt politiskt fyribrigdi. Síðani valið hevur hann fyri tað mesta skotið í blindum eftir øllum sum rakst framvið tinggáttini, loypt ólag á uppskot, sum vóru Suðuroynni at frama og seinasta fríggjadag, í Dimmalætting, hevjar hann seg upp til at vera eitt slag av sjálvbestaltaðum politiskum inkvisitiónsdómstóli. Evnið hesaferð er útbyggingin av Vágs Havn.

Sambært honum er hon ofrað á fullveldisaltarinum og meinastu revskinnini í slátrinum eru Hergeir Nielsen og Jenis av Rana. Vit, sum hava arbeitt við málinum í drúgva tíð kunna bara staðfesta, at maðurin í minsta lagi er politiskt skizofrenur, kanska paranoidur eisini og at hann er í fer við at isolera seg frá allari ávirkan í føroyskum politikki, eisini tá ið tað ræður um framtøk í Suðuroynni.

Sambært lóg er Vágs Havn framvegis almenn samferðsluhavn. Tí var tað øllum greitt, tá ið nýggjur Smyril kom úr stropa, at eitthvørt mátti gerast við havnaviðurskiftini í Vági, soleiðsni at hesin nýggi leinarin, sum nú er kjølstrektur í Spaniu, skuldi kunna sigla sambært løgtingslógini um fólka- og farmaflutning.

Í samstarvi við býraðið har suðuri kom landsstýrið og síðani løgtingið til ta niðurstøðu, at partarnir samskipaðu útbyggingina av djúp- & samferðsluhavn. Løgtingslóg um hesi viðurskifti varð endaliga samtykt fyri valið í fjør. Hetta var áðrenn Johan Dahl hevði havt nakað við føroyskan politikk at gera. Málið kom júst frá fullveldislandsstýrinum, sum eftir drúgva umhugsan og semju legði málið fram og fekk tað samtykt.

Politikkur er at vilja. At vilja loysnir. Samgongan sum nú situr mundi halda at fíggjarorkan, sum var løgd niður í infrakervið í Suðuroy kundi raðfestast betri enn frammanundan varð hildið. Semja varð um, at tað kanska ikki var so skilagott at hava fleiri stórar almennar samferðsluhavnir fjørð um fjørð har suðuri, ístaðin samdust samgongumenn um, at strika Vágs Havn sum almenna samferðsluhavn, at stuðla nýggjari verkætlan í Vági ístaðin, at gera nýggja samferðsluhavn á Trongisvágsfirði og at byrja tunnilsarbeiðið ímillum Øravík og Hov. Fíggjarlógin avspeglar hendan viljan.

Tá ið hesin samferðslupakkin var íkomin gjørdist tað sjálvandi neyðugt at strika upprunalógina um útbygging av djúp- & samferðsluhavn í Vági, sum hevði komið at kosta tí almenna 18,5 milliónir krónur, sum var helmingurin av ætlaðu verkætlanini.

Tað var øllum greitt, at tær almennu Føroyar ikki, soleiðis uttan víðari, bara kundu sleppa sær burturúr hesum málinum, sum tær høvdu verið ein beinleiðis partur av. Ein moralsk skylda lá eftir í málinum. Og sambært álitinum frá vinnunevndini er breið politisk semja um hvussu hendan moralska politiska skyldan skal skiljast og handhevjast. Sagt verður: Vinnunevndin hevur skilt tað soleiðis, at breið politisk semja er um, at landið rindar Vágs Kommunu eina kompensasjón fyri helvtina av byggikostnaðinum, tó í mesta lagi 9 mió kr., vísandi til at stig vóru tikin til eina felags verkætlan millum land og kommunu um útbygging av havnini í Vági, sum nú verður slept í sambandi við, at siglingin hjá strandferðsluni á Vág verður niðurløgd.

Samgongumenninir í vinnunevndini tóku ikki undir við meirilutanum av tí einfaldu orsøk, at vit mettu hetta málið viðvíkjandi Vágs Havn sum eitt einstakt og serligt fyribrigdi. Heldur enn at lóggeva á økinum valdu vit at halda málinum á stuðulsjáttanarstøði. Í mestan mun fyri at forða fyri siðvenju á økinum og eisini tí at vit ikki halda tað vera skilagott, at vinnunevndin situr og tekur framí arbeiðið hjá fíggjarnevndini fleiri ár frameftir.

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri árið 2003 skeyt landsstýrið upp at 7 mió kr. vóru settar av til endamálið. Fíggjarnevndin barberaði hetta talið niður á 5 mió kr, tá ið hildið varð, at Vágs Býráð ikki fekk brúkt fleiri enn hesar 5 mió kr. i inniverandi ári. Restin av helvtini av nýggju verkætlanini hjá býráðnum, ella umleið 4 mió kr., skuldu so setast á fíggjarlógina fyri fíggjarárið 2004. Havi saman við mongum øðrum ongantíð skilt málið øðrvísi, og ætli mær heldur ikki at skilja tað øðrvísi nú tá ið fíggjarlógarviðgerðin fyri árið 2004 verður sett á lunn. Vágbingar skula í somáta sova trygt soleingið fullveldissamgongan ræður fyri borgum í Føroyum.

Ein høvundur segði einaferð, at Sambandsflokkurin var politiskur ómoralur settur í system. Soleiðis sum Johan Dahl ber seg at í hesum málinum man okkurt vera um tað. Ætlar hann at halda fram við hesum atburðinum í sínum politiska lívi, so má bara staðfestast, at hann er ein beinleiðis hóttan fyri øll framtøk og allan framburð í Suðuroy, og í hesum førinum í Vági.

Missilini hann sendir eftir Hergeiri Nielsen og Jenisi av Rana eru luftkastellir sum eingin kann taka fyri fult. Er tað nakar sum liggur flatur í luftini til gagns fyri Suðuroynni, í politiska landslagnum, tá er tað tjóðveldistingmaðurin í Vági. Og tá ið Johan Dahl tosar um luftkastellirnar hjá fullveldissamgonguni veit hann so ikki av at nýggjur Smyril er í gerð, at miðnámsskúli verður smíðaður í Vági, at Almanna- & heilsuskúli er komin á Tvøroyri, at bakkaverjan í Sumba er stuðla, at stuðul verður veittur djúphavnini í Vági, at stór samferðsluhavn verðu gjørd á Trongisvágsfirði, at tunnilsgerðin millum Øravík og Hov byrjar í næstum o.s.fr. Alt komið á lunn ímeðan Sambandsflokkurin hevur sitið í andstøðu og absolut onga ávirkan hevur havt á føroyskan politikk yvirhøvur?

Kanska skuldi næsta greinin hjá hesum politiska sfinxinum snúð seg um Suðuroynna og almenn átøk ímeðan Sambandsflokkurin sat við valdinum í Føroyum. Royktámið hann blæsir framúr sær, og sum hann nú sjálvur er við at villast í, bendir kanska á, at tað var somikið soltið, at onki er at skriva heim um. Ímeðan liggur Suðuroyggin fremst í raðfestingini hjá hesum landsstýrinum, ikki av partapolitiskum orsøkum, men tí hetta er neyðugt skula Føroyar frameftir vera ein livandi og dynamisk samfelagseind.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Fram eftir fummum fór pressan

**Eitt pappír hjá einum politiskum floksformanni kom í farnu viku undan kavi, sum SvF gjørdi stóra gølu burturúr. Kritikkleyst runnu hinir fjølmiðlarnir aftan á SvF og gjørdu gøluna uppaftur størri. Men har var ongin søga. Allir teir stóru fjølmiðlarnir lupu framav og sleptu øllum sunnum journalistiskum fornufti upp á fjall**

**Uni Arge**



Tann stundin má vera komin, at føroyskir fjølmiðlar taka sær um reiggj og fara at rannsaka seg sjálvar. Í farnu viku vóru vit vitni til eina røð av margháttligum hendingum í SvF, ÚF, Sosialinum og Dimmalætting, sum tæntu hesum miðlum til lítlan sóma og enn minni gjørdu umdøminum hjá journalistikkinum sum faki nakra góða tænastu.

Alt byrjaði við, at nøkur tíðindafólk hjá SvF snoddaðu seg fram til eitt pappír á Gamla Apoteki, sum formaðurin í Tjóðveldisflokkinum hevði skrivað. Í pappírinum hevði hann fyrireikað seg sjálvan og sín flokk uppá, hvat sigast skuldi, um avgerandi fundurin millum floksformenninar í samgonguni fekk tað úrslit, at ósemjan í samgonguni stóð við.

Ætlanin sambært pappírinum var at kalla inn til tíðindafundar og greiða frá støðuni hjá Tjóðveldisflokkinum til stevið í samgonguni og politisku høvuðsmálini annars. Í pappírinum stóð nágreiniliga, hvat flokkurin skuldi siga við fjølmiðlarnar, og hvørji evni ymisk fólk í flokkinum skuldu tosa um á tíðindafundinum, ið kanska skuldi haldast.

SvF gjørdi stóra gølu burtur úr hesum pappíri og læt okkum ikki misskilja, at ein politikari her hevði gjørt eitt leikrit, sum hann skuldi manipulera fjøldina við, og at samgongukreppan var ein sjónleikur. Tann ósagdi og tó so eyðsýndi boðskapurin var, at maðurin dugir at snara veruleikanum, tí hann hevur kandidatútbúgving í samskifti.

Okkurt annað enn journalistisk dømikraft má hava verið orsøk til, at hetta innslagið nakrantíð slapp í luftina, tí tað hevði onki við sakligan journalistikk at gera. Tað snaraði veruleikanum grovt og undirgróv trúvirðið hjá offrinum, sum hevði rætt til at verja seg, men ikki slapp. Hvør var søgan? Hvat hevði maðurin gjørt seg sekan í? At hann hevði fyrireikað seg og sín flokk til ein tíðindafund? At hann hevði avgjørt, hvat hann skuldi siga?

Sum útbúgvin journalistur var eg illa við, tá eg hevði sæð innslagið, tí eg skilti ikki, hvat SvF vildi. Eg skilti tó so mikið, at hetta persónliga álopið í bestu senditíð fór at verða funnin fressur hjá politisku mótstøðumonnunum hjá formanninum í Tjóðveldisflokkinum. Hans Pauli Strøm, Jóhan Dahl og Óli Petersen lógu heldur ikki sjóvarfallið av sær og lupu á við stórum orðum og strikum.

Teir tríggjar skilti eg væl. Teir sóu sær ein kærkomnan møguleika í einum politiskum spæli, sum mangan er køstaskitið kortini. Men eg skilti ikki Útvarp Føroya, sum klokkan 8.00 morgunin eftir innslagið í SvF bar fram sum stórtíðindi, at SvF hevði funnið eitt pappír, og at SvF segði, at samgongukreppan var ein leikstjórnaður sjónleikur. Ongin kritisk viðgerð í ÚF av sokallaðu søguni hjá SvF. Bara blind endurgeving av einum øðrum miðli, sum um miðlar per definitión eru tann heilagi sannleikin.

Í døgurðasendingini hjá ÚF kom meira javnvág í. Tá slapp høvuðspersónurin loksins at verja seg. Hann avsannaði, at nøkur niðurstøða um samgongusamstarvið var gjørd, áðrenn samgonguflokkarnir fóru á avgerandi kreppufundin. Altso ongin leikstjórnaður sjónleikur. Hann viðgekk tó, at hann hevði fyrireikað seg til ein tíðindafund og avgjørt, hvat hann ætlaði sær at siga. Eisini løgmaður avsannaði, at nøkur niðurstøða var gjørd undan fundinum. Men SvF fekk sína nýggju politisku konflikt, tí í sama andadrátti gav løgmaður av órannsakiligum orsøkum til kennar, at hann var ikki sørt lumpaður.

ÚF fataði ikki ella vildi ikki skilja, at har var ongin gøla, og at veruleikin var, at samgongan hevði gjørt semju um at halda fram við samstarvinum, tí fimm tímar seinni varð skipað fyri kjaki í Sostatt um politisku støðuna. Stórt hóvasták varð gjørt burturúr, at samgongumenn eftir nýíkomnu balladuna á døgurða høvdu sent avboð til sendingina. Dramatikkur í luftini. Var samgongan longu skrædnað? Sum neyðloysn læt ÚF mikrofonirnar upp fyri lurtarunum. Tað var í lagi. Men so fór útvarpsverturin brádliga at lesa dulnevnd teldubrøv.

Í nógvar minuttir læt verturin dulnevndar telduskribentar fáa luft fyri sínum politisku frustratiónum. Tann, sum fekk flestu skolurnar oman yvir seg, var tann í sjónvarpinum úthongdi floksformaðurin. Vit fingu ongantíð at vita, hvør skrivaði hesi brøv. Vit hoyrdu bara vertin endurgeva tey. Tað má merkja, at Útvarp Føroya sum stovnur hevur fulla ábyrgd av óreinu álopunum, sum varpað vórðu út í luftina hesa løtuna.

Sum lurtarar mugu vit hava loyvi til at spyrja, hvussu sovorðið kann henda. Meðan bløðini eru so mikið at sær komin, at tey næstan heilt hava avsagt dulnevndu lesarabrøvini, tí tey í meira enn 100 ár hava forpestað føroyska samfelagskjakið, gongur ÚF øvugtan veg og ger seg til talsmann fyri politiskari útspilling, ið líkist ærumeiðing. Tað var sanniliga ikki gamalt.

Men íspunna gølan hjá SvF steðgaði ikki í ÚF. Hon fann sær eisini veg inn í stóru bløðini, har nakrir av frægastu eygleiðarunum í samfelagskjakinum elegant hoppaðu á sjógv. Bæði í Sosialinum og Dimmalætting vildu oddagreinirnar vera við, at SvF hevði gjørt eitt bragd við sínum innslagi. Sosialurin tók enntá hattin av fyri SvF og endurgav haraftrat innslagið púra kritikkleyst í fullari longd. Dimmalætting jublaði um tjóðleikin og politisku kabarettina, men var tó so fræg, at hon hevði fingið orðið á tann álopna.

Hvat hendi álvaratos á fjølmiðlunum hesar báðar dagarnar? Varð allur etikkur tveittur fyri borð? Hvarv allur kritiskur sansur? Meg lysti at frætt, um leiðslurnar á miðlunum innast í journalistiska hjartanum halda, at alt fór so rættvíst fram í hesum máli. Hugsaði ongin, at einum politikara má vera loyvt at fyrireika seg til ein tíðindafund? Hví metti SvF, at pappírið var ein stór journalistisk søga? Um søgan var so týdningarmikil, hví hoyrdist ikki eitt einasta kis til málið hóskvøldið og fríggjakvøldið?

Tíðindaleiðarin í SvF sigur í bløðunum leygardagin, at innslagið skuldi lýsa endan á kreppuni í samgonguni, og at SvF eftir drúgva umhugsan valdi at lýsa endan, sum gjørt varð. Í sama andadrátti sigur hann, at innslagið skuldi lýsa, hvussu summir politikarar fyrireika seg, áðrenn teir skulu hitta fjølmiðlarnar. Hetta hongur ikki saman. Var vinkulin, at kreppan í samgonguni var av, ella var vinkulin, at ein politikari hevði fyrireikað seg til at hitta pressuna?

ÚF hevur ikki enn gjørt viðmerkingar til tað, sum hendi, men stovnurin kundi greittt lurtarunum frá, hví sokallaða søgan hjá SvF skuldi endurgevast kritikkleyst mikumorgunin, og hví stovnurin hevur avgjørt, at lesast skal upp úr dulnevndum teldubrøvum í bestu senditíð. Bløðini hava kanska eisini eina meining um journalistisku dygdina í viðgerðini av hesum máli.

Ein trygd fyri fjølbroytni í journalistisku upplýsingini er, at vit hava fleiri sjálvstøðugar tíðindaredaktiónir, sum gjøgnumhugsa sjálvstøðugar vinklar av ymsu málunum og tora at seta spurnartekn við, hvat hinir fjølmiðlarnir gera. Men tá allar redaktiónir sleppa allari sjálvstøðugari hugsan og í kór rópa halleluja um eitt mál, sum ikki er nakað mál, líkist tað ódámligum samanspæli. Eitt sakligt kjak um føroyskan journalistikk og leiklutin hjá fjølmiðlunum í samfelagnum hevði verið tiltrongt nú, og lógin um ábyrgdina hjá fjølmiðlunum eigur at verða sett í gildi sum skjótast.

# Kapping millum Ung Virki á Torginum í SMS

TÍÐINDASKRIV

Týsdagin 25. mars kl. 10.00 – 17.30 hevur Ungt Virki á Føroya Handilsskúla søluframsýning og kapping á Torgininum í SMS. Framsýningin er samstundis skipað sum ein próvtøka, har ungu virkini hava framløgu fyri almenninginum og dómarum. Besta virki sleppur víðari í kappingini, har tað skal kappast við onnur ung virki í Danmark. Hendan kappingin verður í Keypmannahavn í døgunum 25.-26. apríl hjá Dansk Industri.

Hetta er fjórða kappingin síðan 1997, har ungu virkini kappast um eitt pláss í donsku finaluni. Í 1997 og 1999 varð endaliga próvtøkan í SMS, meðan hon í 2001 var á Handilsskúlanum á Kambsdali. Í ár verður Torgið í SMS so aftur karmur um próvtøkuna, og fara ungu virkini týsdagin 25. mars at sýna fram, selja og greiða frá um virkini og úrdráttir sínar.

Í ár eru fimm virkir við í kappingini um at gerast besta unga virkið. Hesi virkini – ella íognarfeløgini, sum tey vera rópt – eru Gabb, Gagn, FFE, LBH og Vitan.

Vinnarin av kappingini verður avdúkaður á Torginum í SMS týsdagin kl. 15.30.

At døma verða umboð frá stuðlunum, Føroya Sparikassa, Vinnuhúsinum og SMS. Øll hesi árini hevur neyvt samstarv verið við SMS, Føroya Sparikassa, Toll-og skatt og Vinnuhúsið. Lærari hjá Ungu Virki tvey seinastu árini hevur verið Martha Weihe Dalsgaard.

### Stutt um virkini:

Gabb er virki, sum tær fýra Guðrun Vatnhamar, Ann Tordis K. Hellisdal, Birita L. Hansen og Bjørg Clementsen mynda. Tær hava givið út eina barnafløgu við kendum barnasøgum eftir m.a. brøðrunum Grimm og H.C. Andersen. Eisini eru tvey løg hjá Brandi Enni á fløguni.

Vøran, sum íognarfelagið Gagn hava framleitt er ein sankutøðkassa (kompostkassa) til burturkast. Tey fimm, ið mynda Gagn eru: Marjun Hansen, Durita Poulsen, Elisabeth Jacobsen, Jannet Hansen og Jaspur T. Gaard>

Faroese Film Entertainments: Teir hava sett í framleiðslu ein videofilm við gomlum upptøkum hjá Zakarias Hammer Virkiseigararnir eru: Eilif Høgnesen, Tóri Bendtsen, Pætur Rasmussen, Olaf Olsen, William Olsen og Sólvit Nolsøe.

Vitan: Teir leggja tíðindi og kunning um tøkni út á heimasíðu. Virkiseigararnir eru: Ragnar Thomassen, Hanus Mikkelsen, Kristian Joensen og Ragnar Isaksen.

LBH: Framleiður og selur brústsukur.

Virkiseigararnir eru: Lív Krosstein, Bárður Thomsen og Heidi Borum Hansson.

Skúlaárið 1996/97 fór Føroya Handilsskúli undir eina nýggja lærugrein, sum teir nevndu "Ungt Virki". Hugskotið til lærugreinina fekk Sonja Oyrabø Petersen, sum hevur verið samskipari av lærugreinini síðan byrjan, tá ið hon leitaði eftir møguligum nýggjum lærugreinum til skúlan. Helst skuldi tað vera lærugreinar, har næmingarnir skuldu annað enn bert kaga í skúlabøkurnar og lesa uppá. Síðan Handilsskúlin fór undir lærugreinina eru íalt 20 virki stovnað, rikin og tikin av. Nevnast kann, at vinnarin í 1999, sum gjørdi fløgu við barnasøgum og –sangum, gjørdist nr. 3 í donsku kappingini. Vinnarin í 2001, sum hevði framleitt eitt ullateppi serliga ætlaðum fólkum við gikt, vann ein umhvørvisvirðisløn fyri sín úrdrátt í Young Enterprise International Trade Fair í Stavanger.